# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



5. mars fekk Marna, sum er 2 ár, ein lítlabeiggja, sum var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr. Foreldrini eru Kristbjørg og Jóanes Brøðraberg, Hoyvík

**Føðingar**

23. februar fingu Else og Hanus Sjúrðaberg, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3500 gr.

28. februar fingu Sára Ripley og Guðmundur Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 46 cm. long og vigaði 2150 gr.

2. mars fingu Anita L. Hammer og Jóhann Fagraklett, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4300 gr.

3. mars fingu Janni Johansen og Hans Hammer, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3750 gr.

3. mars fingu Eyð Joensen og Dennis D. Hansen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3200 gr.

3. mars fingu Tórunn Holm og Petur Frank Joensen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

4. mars fingu Aud Knudsen og Jón Jóhannessen, Kolbanargjógv, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4200 gr.

4. mars fingu Olfa og Muhammed Jasin Trabelsi, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3700 gr.

5. mars fingu Trygvi og Bjarta Petersen, Syðrugøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3500 gr.

5. mars fingu Anita Petersen og Jákup Pauli í Eyðansstovu, Sandavágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3350 gr.



3. marts fingu Rannvá Mortansdóttir og Hjalmar Didriksen Apol, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3580 g og var 50 cm til longdar.

**Prógv**

Róin Salberg Olsen hevur staðið royndina sum kondittari á Ringsted Tekniske Skole. Læruplass Klingran, lærumeistari Fríða Hauritz.



**Prógv sum byggifrøðingur**

Hjørleif Klein, Túnagøtu 2, Saltangará hevur lokið prógv sum byggifrøðingur á Københavns Erhvervsakademi.

**80 ár**

8. mars fyllir Hjørmund Vang Hvalba 80 ár. Dagurin verður hildin í Ranhøll tann 15. mars kl. 19. Tey í vilja gleða Hjørmund við at koma í føðingardag. Vinarliga sigið frá innan tann 13/3 08 eftir kl. 18 á tele 375374-260786 ella 221616.

10. mars verður Jona Joensen í Miðvági 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Ingu Svabo leygardagin 8. mars frá kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 8. mars verður Otto Dam, Argir, 80 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**Brúdleyp**

Leygardagin 8. mars kl. 14 giftast, í Kvívíkar kirkju, Tina Debes Julsgart (Tvøroyri) og Johan Faulkner Mouritsen (Stykkið). Eftir vígsluna verður døgurði fyri innbodnum kl. 17 Inni í Bø, á Stykkinum.

Leygardagin 8. mars kl. 16 giftast í Hoyvíkar kirkju Ruth E. Jacobsen úr Tórshavn og Jói Winther av Argjum. Veitsla verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.30.




# Jóannes S. Hansen í Leikalund

**Fríggjadagin 7. mars letur listaframsýningin hjá Jóannesi S. Hansen upp í Leikalund í Klaksvík við 25 nýggjum málningum. Ferniserin verður kl. 17**

Jóannes hevur mála í mong ár, og sýndi hann fram fyrstu ferð í 1965. Tað var í Runavík, í kjallaranum hjá Karl Jóhan Hansen, har býráðið heldur til í dag.

Á framsýningini eru 25 nýggjar akrýlmálningar, sum eru málaðir í vetur.

Ferniseringverður fríggjadagin kl. 17, har Jóannes S. Hansen spælir harmoniku og Monika Stauss Joensen spælir violin

Myndevnið er rættuliga naturalistiskt, við denti á hvussu ymsu árstíðirnar, samdøgrið og dagligu ljóssamansetingarnar hátta sær.

## *Tøkk*

Hjartans tøkk veitist øllum, sum á so mangan hátt mintust meg á sjeyti ára degnum.

Tykkum í samkomuni, sum tóku stig til og gjørdu tað møguligt at hava móttøku og halda føðingardagin í Betesda.

Øllum sum virkaðu, bakaðu, talaðu, sungu, ringdu, sendu blómur, skrivaðu føgur orð og vitjaðu inn á gólvið. Øllum sum komu at gleðast saman og lótu so nógv gott eftir tykkum og síðani øllum hinum, sum ongan møguleika høvdu at koma, tøkk fyri allar heilsanir og góðynski.

**Poul Færø**

*Signað veri tit av Harranum, Honum, sum hevur skapt himmal og jørð*
*Sálmur 115, 15*

## TØKK

*Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum gjørdu Diamantbrúdleypsdagin 14. februar 2008 ógloymandi. Takk fyri brøv, fjarrit, uppringingar, blómur, gávur, sangir og talir. Ein serlig tøkk til Hornorkestrið og sangkórið í Betesda, og tykkum mongu sum komu og heilsaðu uppá okkum. Tit gjørdu okkum so glað og takksom.*

**– MATHILDA OG FRÍÐRIK**



*TÍÐIN RENNUR SUM STREYMUR Í Á FRAM Í HARRANS NAVNI! LÍTLUM BÁTI ERI EG Á, HIMNASTROND FYRI STAVNI.*



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum